# Jákup møguligur brotssparksskjútti

**Fyrsta treytin er kortini, at hann vinnur sera stóru kappingina um plássið millum stólparnar hjá Partick Thistle, sum í dag fer at spæla í fyrsta umfarinum í landskappingini**

NÝGGJ AVBJÓÐING
*Jóannes Hansen*

Í dag fer fótbólturin av álvara á rull í Skotlandi. Har niðri verður roknað við, at tað enn eina ferð fara at vera Glasgow feløgini Celtic og Rangers, sum fara at stríðast um meistaraskapin, og flestu eyguni fara vikuskifti eftir vikuskifti at verða vend ímóti dystunum, sum hesi bæði feløgini fara at vera partur í.

Við føroyskum eygum er mest spennandi skotska felagið nú Partick Thistle, sum skal royna at fóta sær í bestu deildini og kanska sleppa upp í part ímillum seks tey fremstu. Jákup Mikkelsen er málverji í felagnum. Hann hevur staðið seg væl í fyrireikingardystunum, men tað er eingin trygd fyri, at hann verður fyrsta valið millum stólparnar.

– Eg veit væl, at Jákup Mikkelsen er landsliðsmálverji, og at hann vardi føroyska málið sera væl, tá ið teir fyri nøkrum árum síðani taptu 2-1 í Aberdeen. Men tað hevur einki at siga nú. Tað, sum nú ræður um, er at líta fram eftir fyri at finna út av, hvør er tann betri av okkum báðum júst nú. Eg havi áður kappast við aðrar málverjar í hesum felagnum, og eg haldi, at tað er gott við kapping. Bara eg spæli so væl, sum eg veit, at eg eri førur fyri at gera.

Orðini eigur Kenny Arthur. Hann hevur verið fremsti málverjin í Partick Thistle. At hann varð skaddur, var orsøkin til, at felagið keypti Jákup Mikkelsen. Jákup hevur vart málið allar seks ferðirnar, sum felagið hevur fyrireikað seg til nýggja kappingarárið. Teir hava ongantíð tapt, og á ferðini í Írlandi í síðstu viku helt Jákup tætt allar tríggjar ferðirnar.

Jákup hevur fyri langari tíð síðani fingið at vita, at hann verður málverji ímóti Livingston í fyrsta umfarinum í dag, men hann skal spæla upp til sítt besta fyri at halda kappingarneytanum burtur.

Higartil hevur venjarin, Gerry Collins, verið væl nøgdur við avrikini. Bæði hjá málverjanum og miðverjuni, sum hann heldur hevur spælt væl, uttan at gera mistøk og við sera stórum fastleika, myndugleika ella disiplin.

### Ellivu metrarnir

At Jákup Mikkelsen er ein góður fótbóltsspælari er einki nýtt fyri føroyingar. Nú hann hevur verið í Skotlandi í ein mánað, hava teir sjálvandi eisini funnið út av, at Jákup er góður úti á vøllinum, og teir vita eisini, at hann áður hevur verið útispælari í Klaksvík.

Tá ið Partick Thistle var í Írlandi, fingu teir í síðsta dystinum, sum var ímóti Crusaders í Belfast, og sum teir vunnu 3-0, tvær ferðir brotsspark. Fasti brotssparksskjúttin var skaddur, og ein annar helt seg framat. Tað gekk væl hjá honum, tí hann skoraði báðu ferðirnar. Nú er spurningurin, hvør skal skjóta brotsspark, um ella tá ið Partick Thistle fer at fáa brotsspark í landskappingini.

Venjarin, Gerry Collins, hevur lagt til merkis, at Jákup Mikkelsen er tryggur brotssparksskjútti, og hann útilokar ikki, at tað verður málverjin, sum fer at skjóta.

– Tað verður tann av teimum trimum, ið verður fyrstur eftir bóltinum, eftir at dómarin hevur bríkslað, sum fer at skjóta. Men um Jákup Mikkelsen fer at skjóta, so mugu vit tryggja okkum, at hann rennur nóg skjótt aftur í okkara mál, sigur venjarin.

Tá ið Jákup Mikkelsen var í Herfølge royndi hann seg nakrar ferðir sum brotssparksskjútti. Honum eydnaðist fleiri ferðir at skjóta mál, men onkra ferðina kiksaði tað, og tá var neyðugt hjá honum at renna skjótt aftur í egið mál.

Á heimasíðuni hjá felagnum verður spælt við møguleikan, at báðir málverjarnir fara at umboða Partick Thistle, tá ið Skotland og Føroyar fara at spæla á Hampden Park í Glasgow 6. september. Kenny Arthur hevur verið í nánd av skotska landsliðnum, og eina ferð hevur hann verið á beinkinum. Tað var, tá ið Skotland síðst spældi ímóti Litava. Málverjin sigur seg ikki hugsa nakað sum helst um altjóða fótbólt í løtuni. Fyrsta treytin hjá honum, um hann nakrantíð aftur skal røkka so langt, er at vinna plássið millum stólparnar aftur.

Í dag fer Jákup Mikkelsen í fyrstu týdningarmiklu royndina fyri at sannføra um, at hann er rætti maðurin millum stólparnar hjá Partick Thistle.



*Í dag fer Jákup Mikkelsen í fyrstu týdningarmiklu royndina fyri at sannføra um, at hann er rætti maðurin millum stólparnar hjá Partick Thistle*

*Savnsmynd*

# Hørð mótstøða

**Noreg og Rumenia verða mótstøðuliðini hjá Føroyum í komandi EM-undankappingini í manshondbólti**

HONDBÓLTUR
*www.sportal.fo*

Í Hondbóltssambandi Føroya eru tey væl nøgd um, at Føroyar til komandi undankapping skulu spæla móti Noreg og Rumenia.

Ikki minst er tað Noreg, sum skapar gleði, tí fíggjarligi kann hetta gerast ein sannur gloypibiti hjá HSF. Allir teir norsku landsdystirnir verða vanliga sendir beinleiðis í norska sjónvarpinum, og tí kann hetta leggja nakað av pengum eftir sær, og hartil er tað avmarkað, hvussu stórar ferðaútreiðslurnar her eru.

Ítróttarliga er tó eingin ivi um, at talan er um tvey sera sterk lið.

Í tíðindaskrivi sigur Lars Nedergaard, landsliðsvenjari, at Noreg ivaleyst er sterkasta av teimum liðum, sum ikki komu beinleiðis til play-off dystirnar í undankappingini, og hann ivast ikki í, at hetta er besta lið, sum nakran tíð hevur leikt í Føroyum, tá teir koma.

Rumenia er ikki eins sterkt, sum tá liðið fyri fáum árum síðani veruliga varð roknað upp í heimselituna, men hinvegin er heldur einki at ivast í, at eisini teir hava eitt landslið, sum er nakað sterkari enn okkara. Føroyar leiktu annars tveir dystir móti Rumenia í 2000, og í báðum førum var talan um greið tap.

Lutakastið hevur verið í dag, og nú verður tað so ein samráðingarspurningur, hvussu dystirnir verða leiktir, og um tað t.d. verður møguleiki fyri, at Føroyar kunnu fáa báðar dystirnar avgreiddar heima móti onkrum av mótstøðuliðunum.

# Soleiðis plagar at ganga

Í mun til so nógv onnur umfør, so geva hagtølini fyri hetta vikuskiftið at kalla ongan ábending um, nakra greiða søguliga yvirvág á vøllinum. Bert í dystinum millum Skála og HB hevur talan verið um einvegis stigageving, men tey tølini byggja so bara á uppgerðina frá í fjør. Í aðrar mátar kann bara staðfestast, at tað vanliga er sera tætt, tá gøtumenn vitja við Løkin, og tó at ein yvirvág er at hóma í hinum trimum dystunum, so er hendan ikki á nakran hátt ovurhonds stór.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava tørnað saman í tilsvarandi uppgerðunum seinastu 10 árini.

**-jm**

| | '02 | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skála-HB | 0-3 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-1 | 0-3 |
| NSÍ-GÍ | 3-2 | 1-2 | 1-1 | 1-1 | 3-1 | 2-2 | - | 0-1 | 0-1 | - | 2-3-3 | 11-11 |
| FSV-VB | - | 3-2 | 2-2 | - | - | 1-0 | 2-0 | 2-4 | - | - | 3-1-1 | 10-8 |
| KÍ-EB/S | 3-1 | 0-4 | - | - | - | - | - | - | 8-2 | - | 2-0-1 | 11-7 |
| B36-B68 | 4-0 | 1-0 | 1-2 | 4-0 | 2-1 | 2-1 | 4-3 | 0-4 | 2-3 | 0-0 | 6-1-3 | 20-10 |







Ole Ivars



í Høllini á Hálsi
Leygardagin 6. sep. kl. 23-04
Atgongumerkir fáast
í Statoilstøðunum kring landið
og í Kunningarstovuni í Havn
250 kr.
ATLANTIC AIRWAYS · STATOIL · Hotel Føroyar · SMS · FAXE

## Mini gravmaskina

Alt arbeiði við mini gravmaskinu verður gjørt.

Ring og avtala prís.

**á tlf. 212631 ella 441631**

## Til sølu

**Lastbilar**
Volvo F10 6x2 v/ kassa
Scania 142H 6x2 dumparalast/sleipari
MAN 26.361 6x6 skiftilast/-krana

**Gravimaskinur**
Brøyt x30 og tilhoyrandi frontlesari
Pel-Job LS2000 3,6T

**Persónbilar**
Ford Escort, árg. 1984
Mitsubishi Galant 1.8TD árg. 1990
Mitsubishi Shogun 2,5TD árg. 1989

**Leguvognar**
Schmitz niðurbygdur
Schmitz hurðar vinstru síðu

**Tlf. 212104 - 332104**

## TIL SØLU



**MITSUBISHI PAJERO**
**2800 TURBO intercooler**

Árgangur: 2001/08
Km: 27.000
HK: 125

Aircondition
Fjarstýrt centrallás
CD spælara
El- spegl/rútar
Krók
Gáttir, alu-felgur, gittara o.a.
v/MVG

**Tel. 211 211**



**Búfelagi søkist!**

Søkt verður eftir einum/ari at deila mitt raðhús við. Tað er 90 m² til støddar og liggur í einum sera friðarligum umhvørvi í Høje Taastrup vid Kbh. Húsið er í sera góðum standi, við stórum baðiverilsi, køki, tveimum kømurum og stovu. Ein møguligur leigari fær tað størra kamarið, ið er uml. 16 m². Havi er á báðum síðum, og sólin sleppur framat frá tíðliga á morgni til seint á kvøldi. Tokið er einans 10 min herfrá og tað tekur uml. 15 minuttir inn til Keypmannahavnar. 5 minuttir til gongu herfrá liggur City 2, sum er ein risastórur handilsdepil. Hevur tú nógv, ið skal goymast, so er stórt loftsrúm og ein fittligur skúrur uttanfyri.

Til leigu frá 1. september.
Prísur 3.500 kr. við øllum.
Ring og hoyr meira

Bjarni 0045 51 66 22 62

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin www.sosialurin.fo